Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

**AVRIT**

# SEV

## Notat um avskrivingar – 29. apríl 2013

---


HOYVÍKSVEGUR 5
P.O.BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN
FAROE ISLANDS

TEL. +298 35 17 00
FAX +298 35 17 01

JANUAR@JANUAR.FO
WWW.JANUAR.FO

JANUAR
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

**INNIHALDSYVIRLIT**


Inngangur ..... 3

Samandráttur ..... 3

Almenn lýsing av materiellari støðisogn og avskrivingum ..... 5

Nýttur avskrivingarháttur hjá SEV ..... 5

Avskrivingar og gjaldføri ..... 8

Skjal A – Árligar avskrivingar eftir gamla og nýggja avskrivingarháttinum ..... 10

Skjal B – Ávirkanin avskrivingarhátturin hevur á einstøk aktiv – eitt dømi ..... 12

Skjal C – Dømi um avskrivingar av høvuðsumvælingum ..... 14

Skjal D – Rakstur og gjaldføri 2008-2012 ..... 16

Skjal E – Dømi um avskrivingar av ítøkiligum íløgum eftir gamla og nýggja avskrivingaráramálinum ..... 18

## Inngangur

Vit hava frá leiðsluni í SEV fingið áheitan um at gera eitt notat um avskrivingar. Orsøkin til hesa umbøn er tann, at eigararnir í SEV hava eftirlýst eina lýsing av, hvussu avskrivað verður og hvussu avskrivingarnar ávirka úrslit og gjaldføri hjá SEV.

Hetta notat er skipað soleiðis, at fremst er ein almenn lýsing um støðisogn og avskrivingar, áðrenn hugt verður nærri at, hvussu gjørt hevur verið í SEV, umframt hvørja ávirkan hetta hevur á búskapin hjá felagnum. Notatið er strukturerað sum niðanfyri víst.

1. Samandráttur
2. Almenn lýsing av materiellari støðisogn og avskrivingum
3. Nýttur avskrivingarháttur hjá SEV
4. Avskrivingar og gjaldføri
5. Skjøl A til E

## Samandráttur

Allýsingin av materiellari støðisogn er, at talan er um støðisogn, sum er til varandi ogn ella nýtslu. Í vanligari talu merkir hetta, at talan er um ognir, sum verða nýttar í eitt longri áramál, og sum ætlast at kunna vera við til at vinna fyritøkuni inntøkur í livitíðini hjá støðisognini.

Av tí at ognirnar verða nýttar yvir fleiri ár og í nøkrum førum nógv ár, verður kostnaðurin av íløguni ikki útreiðsluførdur yvir rakstrarroknskapin í einum, men íløgan verður førd sum ein ogn í fíggjarstøðuni. Nýtslan av hesi ogn skal tó eisini førast í rakstrarroknskapin, og hetta verður gjørt sum avskrivingar yvir mettu livitíðina av ognunum.

Fram til og við 2008 avskrivaði SEV fyri tað mesta samsvarandi lánitíðarskeiðnum og eftir sera varisligum avskrivingarhátti, sum viðførdi, at avskrivingaráramálini vóru í flestu førum rættiliga stutt. Í sambandi við, at nýggjar treytir sambært elveitingarlógini vórðu settar í gildi pr. 1/1-2009 álegði Elveitingareftirlitið SEV nýggjar avskrivingartíðir.

Útyvir av áleggja SEV nýggjar avskrivingartíðir varð álagt at rætta eginognina og materiellu støðisognina soleiðis, at allar aktiveraðar ognir skuldu gjøgnumgangast, og gerast skuldi upp, hvørji virðini høvdu verið um tær einstøku íløgurnar høvdu verið avskrivaðar eftir nýggja leistinum frá byrjan.

Hendan gjøgnumgongd førdi við sær, at íalt kr. 629 mió. blivu "vaktar" aftur og skuldu tí avskrivast av nýggjum. Eginognin hjá SEV vaks við hesi upphædd og minkar so aftur yvir eftirverandi avskrivingartíðina hjá teimum einstøku ognunum.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Um hugt verður at teimum ognum, sum SEV átti tann 1/1-2009 koma vit til, at munurin millum árligar avskrivingar eftir gamla leistinum og nýggja leistinum eru kr. 6,0 mió í 2009 og hesin munur veksur til næstan kr. 30 mió í 2023. Síðani minkar hetta niður til umleið kr. 25 mió. Framtíðar íløgur verða avskrivaðar yvir longri áramál, og tí verða árligu avskrivingarnar av nýggjum íløgum lægri enn undanfarin ár. Ein meira útgreinað talva er í skjali A.

Eftir 2030 hevði næstan einki verið eftir at avskriva eftir gamla avskrivingaráramálinum, meðan avskrivingar eftir nýggja avskrivingaráramálinum høvdu verið á leið tær somu sum í 2030 fyrstu árini eftir hetta og síðani minkað. Eftir umleið ár 2050 er kravda virðisøkingin frá 2009 uppá kr. 629 mió. næstan fult avskrivað. Framtíðar íløgur verða nú avskrivaðar yvir longri áramál enn áður, og tí verða árligar avskrivingar av nýggjum íløgum lægri enn farin ár. Dømi um hetta sæst í skjal E.

Um tað hevði verið møguligt hjá SEV bert at broytt avskrivingaráramál frameftir, hevði munurin verið umleið kr. 30 mió árliga frá 2009 og frameftir, og úrslitið hjá SEV við somu elprísum hevði sostatt verið umleið kr. 30 mió betri fyri hvørt ár, sum er farið og fer næstu árini. Hetta kundi givið møguleika fyri, at elprisurin lækkaði ella gjaldføri var nýtt sum eginfígging til framtíðar íløgur.

Á teimum fylgjandi síðunum er ein meira nágreinilig gjøgnumgongd av hesum evni.

Tórshavn, hin 29. apríl 2013

| | |
|---|---|
| Hans Laksá<br>statsaut. revisor | Jørmann Petersen<br>statsaut. revisor |

# Almenn lýsing av materiellari støðisogn og avskrivingum

Allýsingin av materiellari støðisogn er, at talan er um støðisogn, sum er til varandi ogn ella nýtslu. Í vanligari talu merkir hetta, at talan er um ognir, sum verða nýttar í eitt longri áramál, og sum ætlast at kunna vera við til at vinna fyritøkuni inntøkur í livitíðini hjá støðisognini.

Av tí at ognirnar verða nýttar yvir fleiri ár og í nøkrum førum nógv ár, verður kostnaðurin av íløguni ikki útreiðsluførdur yvir rakstrarroknskapin í einum, men íløgan verður førd sum ein ogn í fíggjarstøðuni. Nýtslan av hesi ogn skal tó eisini førast í rakstrarroknskapin, og hetta verður gjørt sum avskrivingar yvir mettu livitíðina av ognunum. Her skal leggjast til merkis, at fyritøkan skal, í sambandi við at íløgan verður gjørd, meta um, hvussu lang livitíðin kann væntast at vera.

Um t.d. ein maskina verður keypt, og hon kostar kr. 10 mió. og hevur eina metta livitíð uppá 10 ár, verða árligu avskrivingarnar 10/10 svarandi til kr. 1 mió. Tað merkir altso, at í rakstrinum hjá fyritøkuni verður ein árligur kostnaður uppá kr. 1 mió. fyri hesa maskinu, hóast hon varð goldin fyrsta árið, og gjaldføri tí minkar við kr. 10 mió. fyrsta árið. Um hendan maskina verður fíggjað við lántøku, koma rentuútreiðslur afturat, men hetta ávirkar ikki roknskaparligu viðgerðina av støðisognini í aðrar mátar.

Spurningurin um roknskaparligu viðgerðina av íløguni skal viðgerðast hvørja ferð ein íløga ella eitt keyp verður gjørt. Eingin ivast í, at tá ið bensin verður keypt á ein bil hjá fyritøkuni, ella telefonrokningin fyri ein einstakan mánaða verður goldin er talan um kostnað, sum verður útreiðsluførdur beinanvegin, og tað er heldur eingin, sum ivast í, at tá ið t.d. ein nýggj vindmylla verður keypt, er talan um eina íløgu, sum verður aktiverað og avskrivað. Men tað er nógv, sum liggur millum hesi dømi, og tað kann vera truplari at taka støðu til, og tá skal leiðslan gera eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri.

Metingin verður grundað á ymisk viðurskifti, men tað hevur avgerandi týdning, um tað keypta skal nýtast yvir stutta tíð (minni enn eitt ár), ella um leiðslan væntar og ætlar, at tað keypta verður nýtt yvir eitt longri áramál.

# Nýttur avskrivingarháttur hjá SEV

Vanliga verður sagt, at tá ið ein íløga verður fíggjað við lántøku, er tað skilagott, at lánitíðarskeiðið er tað sama sum væntaða livitíðin, ið íløgan hevur. Á tann hátt verða avskrivingarnar tær somu sum avdráttirnir av láninum, og soleiðis kunnu avskrivingar ofta samanberast við avdráttir, men hetta kann bert gerast, um íløgan er 100% lánifíggjað, og avskrivingaráramálið og lánitíðarskeiðið er tað sama. Tað er sjáldan galdandi í praksis.

SEV hevur gjøgnum árini nýtt hendan leistin nógv, tá ið avskrivað hevur verið, og tí eru tað summi sum hava sagt, at SEV áður hevur avskrivað yvir ov stutt áramál, og árligu avskrivingarnar hava tí verið ov stórar.

Tá ið nýggjar treytir sambært elveitingarlógini vórðu settar í gildi 1/1-2009, skuldi roknskapurin hjá SEV gerast upp eftir ársrokskaparlógini. Hetta gav sum so ikki tær stóru broytingarnar.

Elveitingareftirlitið metti tó, at SEV hevði avskrivað ov nógv farnu árini, og Elveitingareftirlitið setti tí eisini krav um, hvørjar livitíðir skuldu ásetast í samband við avskrivingarnar av støðisogn. Hesar livitíðir framganga beinleiðis av netloyvinum og framleiðsluloyvunum hjá SEV.

Broytingarnar í avskrivingaráramálinum, sum kravt av Elveitingareftirlitinum, framganga av talvuni niðanfyri.

| | Fram til 1/1-2009 | Eftir 1/1-2009 |
|---|---|---|
| Net | 14 | 35 |
| Anlegg | 10 | 30 |
| Bygningar | 20 | 50 |
| Termisk verk | 10-15 | 25-30 |
| Vatnorkuverk | 20 | 50 |
| Vindorkuverk | 10 | 15 |
| Livitíðsleinging | 0 | 10-25 |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 | 3-5 |

Elveitingareftirlitið metti tað upprunaliga at verða neyðugt bæði við longri avskrivingartíðum fyri framtíðina, umframt at SEV skuldi meta allar sínar ognir av nýggjum. Eftir drúgvar samrøður um loysnir og treytir annars endaði tað við verandi loysn, sum innibar, at SEV broytti tølini soleiðis, at fíggjarstøðan sá út sum hon hevði gjørt, um SEV alla tíðina hevði avskrivað eftir nýggju kravdu áramálunum.

Hetta viðførdi at 629 mió blivu lagdar afturat eginognina hjá SEV, og neyðugt er tí eisini at avskriva hesar kr. 629 mió yvir eitt ávíst áramál, og sostatt skal hetta førast í raksturin hjá SEV einaferð afturat.

Í skjali B eru víst nøkur dømir uppá hvørja ávirkan broytingin hevur á eina hugsaða íløgu. Hetta eru ikki ítøkilig dømi, men vísir framferðarháttin, sum skal brúkast frá 2009 at rokna. Dømi c) vísur munin millum kravið frá Elveitingareftirlitinum og uppskotinum frá SEV.

Nógv samskifti og ein røð av fundum vóru um hetta mál, tí SEV førdi fram, at tað ikki var rætt at gera hetta afturvirkandi, tí at tað fór at viðføra, at avskrivingar partvís skuldu førast yvir raksturin av nýggjum. SEV hevði tó ikki trupulleikar av at broyta avskrivingaráramálið frameftir.

Elveitingareftirlitið metti, at gjørdu avskrivingarnar gjøgnum árini høvdu viðført, at ognirnar hjá SEV SEV stóðu til ov lágt virði í roknskapinum, og við at broyta hesi viðurskifti metti Elveitingareftirlitið,

at betri samanhangur var millum avskrivingaráramál og veruligu livitíðina av ognunum, eins og mett varð, at ognirnar hjá SEV komu at standa til eitt rættari virði í roknskapinum. Elveitingareftirlitið stóð tí fast, og vildi hava SEV at innføra hendan framferðarhátt, og tí var ikki annað at gera hjá SEV enn at góðtaka, at soleiðis skuldi ársroknskapurin gerast í framtíðini.

*Livitíðsleingingar*

Tað hevur eisini týdning, um tað keypta er ein nýíløga, ella um tað keypta er ein umvæling av einari ogn (t.d. maskinu), sum felagið longu eigur og avskrivar.

Fyrr var tað galdandi, at ein umvæling av einari ogn var útreiðsluførd, meðan treytin fyri aktivering var, at talan var um nýíløgu ella munandi betringar. Í flestu førum er hetta framvegis galdandi, men tað eru tó undantøk og tað er serliga aktuelt fyri SEV.

Tá ið talan er um størri ognir, t.d. ein motorur ella ein vindmylla, sum hava eina livitíð uppá t.d. 20 ár, kunnu ætlaðar regluligar høvuðsumvælingar aktiverast og avskrivast yvir tíðarskeiðið fram til næstu høvuðsumvæling.

SEV hevur broytt mannagongd frá 1/1-12 at rokna, soleiðis at farið verður yvir til møguleikan, sum er lýstur í skjali C. Hesin møguleiki gerst alt meira vanligur aðrastaðni og eisini í Føroyum innan fyri aðrar vinnur.

Sum nevnt hevur SEV valt at fara yvir til at aktivera høvuðsumvælingar og avskriva hesar yvir tíðarskeiðið til næstu umvæling. Samsvarandi ársroknskaparlógini er hetta broyttur roknskaparháttur, og tí vera samanberingartølini seinastu 5 árini rættað samsvarandi.

| Mió. kr. | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Áður útreiðsluført nú aktiverað | 15,2 | 8,4 | 14,6 | 15,4 | 12,0 | 65,6 |
| Øking av avskrivingum grundað broyting í roknskaparhátti | 0 | 2,3 | 3,3 | 5,3 | 5,3 | 16,2 |
| Endalig ársúrslit eftir broyting í roknskaparhátti | -15,9 | 15,4 | -46,5 | -39,3 | -12,3 | -98,6 |
| Upprunaúrslit | -31,1 | 9,3 | -57,8 | -49,4 | -19,0 | -148 |
| Ávirkan uppá ársúrslitið við hesum broytingum | 15,2 | 6,1 | 11,3 | 10,1 | 6,7 | 49,4 |

## Avskrivingar og gjaldføri

Sum nevnt í innganginum verða íløgurnar í rakstrinum býttar yvir eitt ávíst áramál, og hetta verður nevnt avskrivingar. Avskrivingar eru tí ikki kostnaðir, sum verða goldnir leypandi, og avskrivingar hava tí ikki beinleiðis ávirkan á gjaldføri hjá eini fyritøku.

Tað kann hava týdning, um prísásetingin er tengd at úrslitinum í rakstrarroknskapinum ella um prísásetingin er tengd at gjaldførisúrslitinum. Niðanfyri er sett upp á ein einfaldan hátt, hvussu avskrivingar ávirka úrslitið og gjaldføri.

Ovari parturin er eitt brot úr rakstrarroknskapinum, harav tað framgongur, at avskrivingarnar verða drignar frá, áðrenn úrslitið verður funnið. Niðari parturin er brot úr gjaldførisfrágreiðingini, harav tað framgongur, at avskrivingar verða lagdar afturat úrslitinum í rakstrarroknskapinum fyri at finna gjaldførisúrslitið.

| | 2012 | | 2011 |
|---|---|---|---|
| Úrslit áðrenn avskrivingar | 55.506 | | 21.856 |
| Avskrivingar | -67.776 | | -61.113 |
| Ársúrslit | **-12.270** | | **-39.257** |
| | | | |
| | | | |
| Ársúrslit | -12.270 | | -39.257 |
| Avskrivingar | 67.776 | | 61.113 |
| Gjaldførisúrslit frá rakstri | **55.506** | | **21.856** |
| | | | |

Vit skulu leggja dent á, at hetta er gjørt munandi einfaldari, enn tað er í veruleikanum, tí munurin á úrslitinum í rakstrinum og gjaldførisúrslitinum er nógv annað enn avskrivingar. Nevnast kann broyting í skuldarum, ognarum og goymslu eins og gjørdar íløgur og lántøka eisini hava týðandi ávirkan á gjaldføri.

So útgangspunktið er, at avskrivingarnar hava ikki ávirkan á gjaldføri. Men tá ið alt kemur til alt, er hetta tó ikki heilt so einfalt, tí tá ið SEV nú skal undir at gera størri íløgur við munandi lántøku, so hava lángevarar sett sum krav, at raksturin hjá SEV skal geva eitt avlop.

Tað hevur tí avgerandi ávirkan hjá SEV fyri at fáa neyðugt gjaldføri til nýggjar íløgur, at raksturin gevur avlop, og tí er tað neyðugt, at prísásetingin og sjálvandi raksturin annars verður skipaður soleiðis, at raksturin gevur avlop. Havast skal í huga í hesum sambandi, at ein partur av avskrivingunum áður eru førdar yvir raksturin, og tí kann á ein hátt sigast, at um úrslitið hjá SEV skal vera positivt, koma kundarnir hjá SEV at gjalda fyri somu avskrivingar einaferð afturat.

Sum kunnugt standa stórar útbyggingar fyri framman, og neyðugt verður tí við stórari lántøku í SEV. Avskrivingaráramálið er longt munandi, og tað er helst ikki realistiskt at fáa fígging yvir stórt

meira enn 20 ár, hóast avskrivingartíðarskeiðið í fleiri førum kann vera longri. Tað kann tí væl hugsast, at lán til tílíka íløgu verður afturgoldið, sum um talan er um lán yvir 40 ár, men eftir 20 árum fellir restskuldin til gjaldingar í einum. Alternativt verður lánið veitt yvir styttri tíð – t.d. 20 ár. Um restskuldin fellur til gjaldingar í einum eftir 20 árum, verður tað neyðugt hjá SEV at endurfíggja hetta (í hesum liggur innbygdur ein nýggjur váði).

Niðanfyri sæst eitt dømi uppá, hvussu hetta kann síggja út.




Myndin omanfyri vísir gongdina yvir livitíðarskeiðið hjá íløguni. Um lánitíðarskeiðið er 20 ár og avskrivingartíðarskeiðið er 40 ár, hevur SEV gjaldførisundirskot av íløguni fyrstu 20 árini uppá kr. 1 mió. um árið. Fyri at gjalda avdráttirnar má SEV brúka gjaldførisyvirskot av rakstri ella fáa aðra lántøku til at gjalda hetta lán niður við.

Sjálvandi hevur SEV eina røð av íløgum og eina røð av lánum, og tí ber sjálvandi ikki altíð so væl til at taka einstakar íløgur burturúr og vita, hvussu hesar hanga saman fíggjarliga.

Í skjali D er ein stutt gjøgnumgongd av úrslitunum seinastu 5 árini og hvussu ávirkanin hevur verið á gjaldføri felagsins, eins og víst verður á í stuttum, hvat gjaldføri felagsins hesi árini er nýtt til.

## Skjal A – Árligar avskrivingar eftir gamla og nýggja avskrivingarháttinum

Munurin millum árligar avskrivingar eftir leistinum sum SEV nýtti fram til og við 2008 og nýggja leistinum, sum SEV eftir kravi frá Elveitingareftirlitinum hevur nýtt frá og við 2009 er vístur í talvuni niðanfyri fyri farnu og komandi árini. Legg til merkis, at framtíðar íløgur eru ikki við í hesi uppgerð. Tølini eru tillagað broytingini í roknskaparhátti, sum greitt er frá í ársroknskapinum fyri 2012.

Framtíðar íløgur verða nú avskrivaðar yvir longri áramál enn áður, og tí verða árligu avskrivingarnar av nýggjum íløgum lægri enn undanfarin ár. Hetta hevur tí eina positiva ávirkan á avskrivingarnar í ársroknskapinum og tí á ársúrslitið.

| Mió. kr. | Árligar avskrivingar | | |
|---|---|---|---|
| Ár | Gamlar | Nýggjar | Munur |
| 2009 | 51,1 | 57,1 | 6,0 |
| 2010 | 52,1 | 58,9 | 6,8 |
| 2011 | 51,9 | 61,1 | 9,2 |
| 2012 | 60,5 | 67,8 | 7,3 |
| 2013 | 58,2 | 63,3 | 5,1 |
| 2014 | 56,3 | 61,9 | 5,6 |
| 2015 | 51,8 | 60,6 | 8,8 |
| 2016 | 45,6 | 57,1 | 11,5 |
| 2017 | 43,5 | 56,0 | 12,4 |
| 2018 | 41,7 | 55,4 | 13,7 |
| 2019 | 35,7 | 48,0 | 12,3 |
| 2020 | 28,7 | 45,9 | 17,2 |
| 2021 | 21,7 | 43,4 | 21,7 |
| 2022 | 13,4 | 41,8 | 28,4 |
| 2023 | 11,0 | 40,5 | 29,5 |
| 2024 | 10,0 | 39,0 | 28,9 |
| 2025 | 8,9 | 38,3 | 29,4 |
| 2026 | 7,4 | 36,3 | 28,9 |
| 2027 | 7,4 | 32,7 | 25,3 |
| 2028 | 7,2 | 31,3 | 24,1 |
| 2029 | 4,2 | 29,2 | 25,1 |
| 2030 | 4,1 | 28,2 | 24,2 |
| Fram til og við 2030 | | | **381,6** |
| 2031-2050 íalt | 30,8 | 274,6 | 243,8 |
| | | | **625,4** |

Av niðanfyristandandi talvu sæst, at nýggju íløgurnar (tilgongd) verða avskrivaðar við eini lægri upphædd árliga eftir nýggja avskrivingarháttinum, enn eftir gamla avskrivingarháttinum, so støðan er í veruleikanum tann, at munurin er størri, hvat teimum ognum, sum SEV átti áðrenn 2009 viðvíkur, meðan íløgurnar gjørdar eftir 1/1-2009 verða avskrivaðar við lægri upphædd eftir nýggja avskrivingarháttinum.

| | Avskrivingar - gamal avskrivingarháttur | | | Avskrivingar - nýggjur avskrivingarháttur | | | Avskrivingar - munur millum avskrivingarhættir | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | uttan tilgongd | tilgongd | **íalt** | uttan tilgongd | tilgongd | **íalt** | uttan tilgongd | tilgongd | **íalt** |
| 2009 | 42,7 | 8,4 | **51,1** | 52,0 | 5,1 | **57,1** | 9,3 | -3,3 | **6,0** |
| 2010 | 40,7 | 11,4 | **52,1** | 51,1 | 7,8 | **58,9** | 10,4 | -3,5 | **6,8** |
| 2011 | 38,1 | 13,8 | **51,9** | 50,6 | 10,5 | **61,1** | 12,5 | -3,3 | **9,2** |
| 2012 | 34,0 | 26,6 | **60,5** | 48,1 | 19,7 | **67,8** | 14,1 | -6,9 | **7,2** |

Skjal B – Ávirkanin avskrivingarhátturin hevur á einstøk aktiv – eitt dømi

**Dømi a) Fult avskrivað aktiv í 2008**

| Íløga í 1999 uppá kr. 100 mió. | Upprunaligur roknskapur | Eftir nýggjum leisti | Eftir krøvum frá Elveitingareftirlitinum |
|---|---|---|---|
| Avskrivingartíðarskeið | 10 ár | 20 ár | 10 ár/20 ár |
| Árlig avskriving | 10 mió | 5 mió | 10 mió/5 mió |
| Avskriving 1999-2008 | 100 mió | 50 mió | 100 mió |
| Avskriving 2009-2018 | 0 | 50 mió | 50 mió |
| Avskrivingar samanlagt | 100 mió | 100 mió | **150 mió** |

Fyrsta dømið er viðvíkjandi einari íløgu frá 1999, sum eftir upprunaligu avskrivinginaráramálinum hjá SEV skuldi avskrivast yvir 10 ár. Nýggi leisturin kravdi, at avskrivingaráramálið bleiv longt til 20 ár, og virðini í roknskapinum skuldu regulerast soleiðis sum tað hevði sæð út, um avskrivað hevði verið eftir nýggja leistinum. Hetta viðførdi soleiðis, at eginognin bleiv hækkað við teimum 50 mió, sum skuldu avskrivast einaferð afturat, og yvir raksturin tey 20 árini eru tí førdar kr. 150 mió. hóast íløgan bert kostaði 100 mió. Í sambandi við umleggingina vóru kr. 50 mió (munurin millum avskrivingar eftir upprunaliga roknskapinum og avskrivingar eftir nýggja leistinum fyri tíðarskeiðið fram til 2008) lagdar beinleiðis afturat eginognini, so samanlagda ávirkanin á eginognina er tó ikki meira enn kr. 100 mió.

**Dømi b) Ikki fult avskrivað aktiv í 2008**

| Íløga í 2004 uppá kr. 100 mió. | Upprunaligur roknskapur | Eftir nýggjum leisti | Eftir krøvum frá Elveitingareftirlitinum |
|---|---|---|---|
| Avskrivingartíðarskeið | 10 ár | 20 ár | 10 ár/20 ár |
| Árlig avskriving | 10 mió | 5 mió | 10 mió/5 mió |
| Avskriving 2004-2008 | 50 mió | 25 mió | 50 mió |
| Avskriving 2009-2023 | 50 mió | 75 mió | 75 mió |
| Avskrivingar samanlagt | 100 mió | 100 mió | **125 mió** |

Annað dømið er viðvíkjandi einari íløgu frá 2004, sum eftir upprunaligu avskrivinginaráramálinum hjá SEV skuldi avskrivast yvir 10 ár. Nýggi leisturin kravdi, at avskrivingaráramálið bleiv longt til 20 ár, og virðini í roknskapinum skuldu regulerast soleiðis sum tað hevði sæð út, um avskrivað hevði verið eftir nýggja leistinum. Hetta viðførdi soleiðis, at eginognin bleiv hækkað við teimum 25 mió, sum skuldu avskrivast einaferð afturat, og yvir raksturin tey 20 árini eru tí førdar kr. 125 mió. hóast íløgan bert kostaði 100 mió. Í sambandi við umleggingina vóru kr. 25 mió (munurin millum avskrivingar eftir upprunaliga roknskapinum og avskrivingar eftir nýggja leistinum fyri tíðarskeiðið fram til 2008) lagdar beinleiðis afturat eginognini, so samanlagda ávirkanin á eginognina er tó ikki meira enn kr. 100 mió.

**Dømi c) Ikki fult avskrivað aktiv í 2008 – bert broyta avskrivingar frameftir**

| Íløga í 2004 uppá kr. 100 mió. | Upprunaligur roknskapur | Eftir nýggjum leisti | Uppskot frá SEV um nýggjan avskrivingarleist |
|---|---|---|---|
| Avskrivingartíðarskeið | 10 ár | 20 ár | 10 ár/20 ár |
| Árlig avskriving | 10 mió | 5 mió | 10 mió/5 mió/3,3 mió |
| Avskriving 2004-2008 | 50 mió | 25 mió | 50 mió |
| Avskriving 2009-2023 | 50 mió | 75 mió | 50 mió |
| Avskrivingar samanlagt | 100 mió | 100 mió | **100 mió** |

Triðja dømið er viðvíkjandi somu íløgu frá 2004 sum omanfyri. Hetta dømi vísir hvussu støðan hevði verið, um Elveitingareftirlitið góðtók uppskotið frá SEV um at broyta avskrivingarleistin frameftir, men ikki broyta nakað í tí, sum farið var.

Hesin leistur hevði ført við sær, at avskrivingarnar fyri seinnu 15 árini høvdu verið kr. 3,3 mió. um árið í staðin fyri 5 eftir leistinum hjá Elveitingareftirlitinum. Harafturat hevði einki verið ført beinleiðis yvir eginognina og avskrivað umaftur.

# Skjal C – Dømi um avskrivingar av høvuðsumvælingum

**DØMI**

| | |
|---|---|
| Íløga: | Motorur |
| Mett livitíð: | 25 ár |
| Kostnaður: | 25 mDKK |
| Ætlað høvuðseftirlit/viðlíkahald: | 5. hvørt ár (ár 6, 11, 16, 21) |
| Kostnaður hvørt eftirlit: | 5 mDKK |

Vanligu avskrivingarnar verða 25/25 t.v.s. kr. 1 mió. um árið. Møguleikin fyri at velja avskrivingarhátt er viðvíkjandi høvuðseftirlitinum. SEV hevur áður valt ta loysn, sum hevur verið vanlig fyrr, og tað merkir, at tær kr. 5 mió sum høvuðseftirlitið kostar fimta hvørt ár verða førdar í raksturin sum útreiðsla í tí árinum, høvuðseftirlitini verða framd. Tað gevur íalt kr. 20 mió. í útreiðslum í rakstrarroknskapinum hesi 25 árini. Í 21 av hesum árum er útreiðslan kr. 0, men 6., 11., 16., 21. árið er útreiðslan kr. 5 mió.

Um vit nýta sama dømi sum omanfyri, broytist myndin í mun til áður nýtta framferðarháttin, sí mynd niðanfyri. Myndin lýsir avskrivingarnar hesi 25 árini eftir báðum hættunum. Høvuðsumvælingin á kr. 5 mió verður eisini nevnd avskriving í hesum føri:



Sum tað sæst á myndini omanfyri, so er gongdin meira støðug við nýggja avskrivingarleistinum. Árligu avskrivingarnar fara frá kr. 1 mió uppá kr. 2 mió. í sambandi við høvuðseftirlitið. Eftir gamla leistinum eru árligu avskrivingarnar kr. 1 mió. flestu árini, men so eru nøkur stór sveiggj í árunum, høvuðseftirlitini verða gjørd.

Samanlagt gevur hetta í báðum førum kr. 45 mió. í kostnaði í rakstrarroknskapinum hjá SEV yvir hesi 25 árini.

Eitt annað undantak er, at møguleiki er fyri at býta heilt stórar íløgur upp í smærri partar. Sum dømi kann nevnast "Eiðsverkætlanin".

Tá ið eitt vatnorkuverk verður gjørt, kann hetta lutast sundur í byrgingar, tunlar, turbinur v.m. og so kann talan vera um at avskrivingar ikki vera yvir líka langt áramál fyri allar partar av íløguni.

Skjal D – Rakstur og gjaldføri 2008-2012

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 355,8 | 316,4 | 278,3 | 277,2 | 274,7 |
| Oljuútreiðslur | 166,0 | 142,6 | 125,3 | 75,9 | 119,9 |
| Tilfar og tænstur | 53,5 | 74,9 | 65,3 | 61,4 | 61,7 |
| **Bruttovinningur** | **136,2** | **98,9** | **87,7** | **139,9** | **93,1** |
| Starvsfólkakostnaður | 60,2 | 62,6 | 65,1 | 62,3 | 57,2 |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | 76,0 | 36,3 | 22,6 | 77,6 | 35,9 |
| Av- og niðurskrivingar | 67,8 | 61,1 | 58,9 | 57,1 | 48,3 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **8,3** | **-24,8** | **-36,3** | **20,5** | **-12,2** |
| Rentukostnaður netto | 20,5 | 14,5 | 10,1 | 5,2 | 3,5 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-12,3** | **-39,3** | **-46,5** | **15,3** | **-15,9** |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | **-12,3** | **-39,3** | **-46,5** | **15,3** | **-15,9** |

Av omanfyri standandi talvu síggjast árligu avskrivingarnar og ársúrslitið seinastu 5 árini. Her sæst, at felagið seinastu 5 árini hevur haft eitt samlað úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar uppá kr. 248,4 mió. Herav skal rentukostnaður frádragast uppá kr. 75,1 mió., soleiðis at felagið hevur haft eitt samlað úrslit uppá kr. 173,3 mió. eftir til rindan av avdráttum uppá verandi skuld, fígging av broyting í rakstrarpeningi og sjálvsfígging av íløgum. Felagið hevur rindað kr. 90,4 mió. í avdráttum seinastu 5 árini.
Niðanfyri standandi talva vísir nettopeningastreymin og gjaldføri hjá felagnum seinastu 5 árini við byrjanina og endan av árinum.

| Nettopeningastreymar frá | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| - Rakstri | 41.871 | 2.221 | 26.810 | 52.570 | 34.497 |
| - Íløgum | -147.858 | -96.093 | -93.464 | -80.268 | -91.778 |
| - Fígging | 136.484 | 108.615 | 72.055 | 40.158 | -18.018 |
| Peningastreymar Í árinum | 30.497 | 14.743 | 5.401 | 12.466 | -75.299 |
| Gjaldføri við ársbyrjan | 56.887 | 42.144 | 36.772 | 24.307 | 99.526 |
| Gjaldføri við ársenda | 87.384 | 56.887 | 42.144 | 36.772 | 24.307 |

Felagið hevur bundið ein nettopeningastreym uppá samanlagt kr. 509,6 mió. í íløgur, sum eru fíggjaðar við einum samlaðum nettopeningastreymi uppá kr. 339,3 mió. frá fígging svarandi til, at felagið hevur eginfíggjað kr. 170 mió. svarandi til 33% av nettopeningastreyminum til íløgurnar í tíðarskeiðnum.

Hevði elprísurin ikki hækkað í 2008 við 0,10 kr. pr. kWt, 0,15 kr. pr. kWt í 2011 og 0,10 kr. pr. kWt í 2012 hevði samlaða inntøka felagsins verið umleið kr. 210-230 mió. lægri, svarandi til onga eginfígging av íløgum, eins og peningur hevði vantað í til vanliga rakstur felagsins. Neyðugt hevði tá verið við munandi størri lántøku ella minni íløgum fyri at javnviga gjaldføri í mun til inntøkur felagsins. Tá felagið hevur veitingarskyldu yvirfyri sínum núverandi og komandi kundum er áhaldandi neyðugt at gera íløgur í framleiðslutól og net, eins og tað er neyðugt at gera viðlíkahald í sama.

## Skjal E – Dømi um avskrivingar av ítøkiligum íløgum eftir gamla og nýggja avskrivingaráramálinum

Niðanfyri hava vit sett upp dømi um, hvussu avskrivingar verða av ítøkiligum íløgum, sum SEV ætlar at gera komandi árini. Talvan vísir, hvussu avskrivingarnar høvdu verið eftir gamla avskrivingaráramálinum, og hvussu avskrivingarnar verða, nú avskrivingaráramálini eru longd.
Íløgurnar eru hesar:

- Íløga í vindmyllulund á kr. 120 mió – liðugt í 2014
- Battarí á kr. 30 mió – liðugt í 2014
- Sundsverk á kr. 350 mió – liðugt í 2016
- Net í sambandi við Sundsverk á kr. 150 mió – liðugt í 2016
- Nýggjur motorur til Suðuroy á kr. 50 mió – liðugt í 2015

| Mió. kr. | Árligar avskrivingar | | |
|---|---|---|---|
| Ár | Gamlar | Nýggjar | Munur |
| 2014 | 14,0 | 10,0 | -4,0 |
| 2015 | 18,0 | 12,0 | -6,0 |
| 2016 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2017 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2018 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2019 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2020 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2021 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2022 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2023 | 56,5 | 30,3 | -26,2 |
| 2024 | 44,5 | 30,3 | -14,2 |
| 2025 | 44,5 | 30,3 | -14,2 |
| 2026 | 44,5 | 30,3 | -14,2 |
| 2027 | 42,5 | 30,3 | -12,2 |
| 2028 | 26,5 | 30,3 | 3,8 |
| 2029 | 10,5 | 20,3 | 9,8 |
| 2030 | 3,0 | 20,3 | 17,3 |
| 2031-2050 | - | 243,5 | 243,5 |
| | **700,0** | **700,0** | **-** |

Um hesar ítøkiligu íløgur verða samtyktar og framdar sum víst omanfyri sæst, at árligu avskrivingarnar av júst hesum íløgum eru munandi lægri árliga eftir at avskrivingaráramálið er longt.